# Útbrot

UMMÆLI

*Kinna Poulsen*
*kinna_poulsen@hotmail.com*
*Myndir Jens K. Vang*



At listabólkurin, sum í løtuni framsýnir í hølum Tórshavnar Skipasmiðju, millum manna verður nevndur "ÚTBRÓTARARNIR", gevur frænir og vónir um eina í føroyskum høpi óvanliga villa og ógvisliga listaframsýning. Eisini gevur hetta, at framsýningin letur upp í einum livandi vinnuøki ábendingar um nakað nýtt, at føroysk list kanska er í hølunum á teimum framfýsnu, sum í øðrum londum longu leingi hava nýtt størri vinnuøki, gamlar fabrikkir og virki til tíðarhóskandi framsýningarskálar hjá samtíðarlistini. Men sæð burtur frá serligu hølisumstøðunum (og onkrum øðrum umstøðum eisini) man Heystframsýningin 2005 ikki gerast nøkur skakandi uppliving fyri føroyska listaáskoðaran. Hon umboðar fyri tað mesta føroyska myndlist av tí góða gamla slagnum. Men hóast talan ikki er um nakra listarliga kollvelting sum so, var ikki frítt, at tú til ferniseringina hómaði roykmiklan anga sum av krúti og kanónum og vínstillan sigursrús sum eftir veldugt slag.

## Ónøgd og dirvi

Hvørji eru hesi tólv uppreistrarfólkini, sum hava tikið seg út úr Myndlistafelagnum og sum ikki longur vilja framsýna í Listaskálanum? Eftir meðalaldrinum at døma (48 ár), er talan ikki um ein ungdómsuppreistur, ei heldur er talan um listarligar outsidarar, sum eftir ár á skuggasíðuni nú vilja krevja sín rætt. Tí Listabólkurin telur millum sínar limir tey mest etableraðu og vællýddu av okkara listafólkum, sum onkursvegna eru vorðin so ónøgd, at tey hava funnið dirvið at fara frá alment stuðlaða listapallinum, tí sonevnda sjálvsognarstovninum í Gundadali til nakað heilt nýtt og óroynt. Og meðan støðan í Listaskálanum føroyskari samtíðarlist viðvíkjandi stendur við og versnar, mugu vit fegnast um vælvild Tórshavnar Skipasmiðju og listahøllina í grøna bygninginum á Rundingi, sum er framúr egnað til listaframsýningar.



*Hanni Bjartalíð*







*Trappan upp til nýggju listahøllina*

## Góðska

Vakra plakatin ber beinavegin boð um góðsku. Marius Olsen hevur gjørt steinprentið, sum er eitt av eini frálíkari røð av grafiskum listaverkum, sum hann sýnir fram á Heystframsýningini. Marius er sera dugnaligur grafikari og tykist í sínum nýggju myndum hava funnið inn til størri einfeldi, sum í støðum minnir ikki sørt um Steffan Danielsen, sum í teimum einfaldastu og minstu myndevnunum fann ta størstu poesiina. Bjarne Werner Sørensen er hin grafikarin á framsýningini. Hann hevur gjørt frálíku myndaskránna, ið fæst óvanliga bíliga til keyps (20 kr). Hann er hálvur føroyingur og vit kenna hann m.a. frá samstarvinum við Tórodd Poulsen m.a. í sambandi við grafiska bókaverkið "Villvísi". Eisini skipaði hann fyri "Far Out" framsýningini við installatiónslist í Listaskálanum í 1996. Bjarne hevur tríggjar stórar prentmyndir við á framsýningini, sum myndevnisliga minna um hansara steinprent og oljumálningar, men sum hvat úttrykki viðvíkur tykist slættari og harvið kanska tamari. Tøkniliga fevnir Heystframsýningin annars fyri tað mesta um oljumálarí, men glas- og gipslist er eisini umboðað. Andrias Andreassen kenna vit kanska best fyri hansara Havnarkonur (1992), standmyndina, ið stendur uttan fyri Keypsamtøkuna í Havn. Stílurin í hesi standmynd er klassiskur og tað sama er galdandi fyri bringumyndirnar hjá Andriasi, sum eru framsýndar á Heystframsýningini. Nú er

*Anker Mortensen*